*Stk. 2.* Justitsministeren kan efter forhandling med forsvarsministeren fastsætte nærmere regler om Forsvarets varetagelse af politimæssige opgaver til søs og i luften efter stk. 1.

**§ 24 e.** Justitsministeren kan efter forhandling med forsvarsministeren fastsætte regler om Forsvarets adgang til at træffe foranstaltninger om at oprette midlertidige militære områder med henblik på at forebygge og afværge fare for dansk og udenlandsk militært personale og materiel, der befinder sig uden for faste militære områder på Færøerne.

## Kapitel 7

### *Ikrafttrædelsesbestemmelser m.v.*

**§ 25.** Anordningen træder i kraft den 1. januar 2021.
*Stk. 2.* § 23, stk. 2, 2. pkt., ophæves den 1. marts 2021.

**§ 26.** Lov nr. 55 af 13. april 1894 om Politiet på Færøerne ophæves.
*Stk. 2.* (Sættes ikke i kraft for Færøerne)

**§ 27.** I retsplejelov for Færøerne, jf. lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004, som senest ændret ved lov nr. 428 af 3. maj 2017, ophæves § 108.

**§ 28.** De forskrifter, der er udstedt efter loven, gælder ikke for Færøerne.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Landsstýrið hevur biðið Løgmálaráðið um at fáa sett í gildi fyri Føroyar lóg nr. 444 frá 9. juni 2004 om politiets virksomhed (politiloven). Galdandi lóggáva er gomul og tørvur er á at dagføra hesa og fáa eina meira tíðarhóskandi lóggávu.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Lógargrundarlagið fyri virkseminum hjá politinum í Føroyum er í dag at finna í fleiri ymiskum lógum, sum skipa sera ymiskar tættir í landinum.

Almennu reglurnar um Føroya Politi eru sera gamlar. Galdandi lóg um Føroya Politi er frá 1894. Hon hevur støði í gomlum politilógum ávikavist frá 1863 um Keypmannahavnar Politi og frá 1871 um Politiið uttanfyri Keypmannahavn, og sum líka inntil 2004 framvegis á fleiri økjum vóru grundarlagið fyri virkseminum hjá politinum í Danmark. Hetta er ikki einans galdandi viðvíkjandi politiviðtøkunum, men m.a. eisini í mun til, hvussu skilhaldspolitiið (gøtupolitiið) bar seg at mótvegis mótmælisgongum.

Ásetingarnar, serliga í rættargangslógini (upprunaliga frá 1916) og revsilógini (upprunaliga frá 1930), hava í stóran mun bæði endurnýggjað og trokað burtur gomlu politilógirnar.

Seinastu áratíggjuni eru reglunar í rættargangslógini um tey revsirættarligu tvingsilsinntrivini stig fyri stig endurskoðaðar og nútímansgjørdar. Innan revsirættargangin er framferðin hjá politinum mótvegis borgarunum við hesum undirløgd eina nágreiniliga og nýggjari lóggávu.

Aðramáta eru einans fáar og sera almennar lógarreglur um valdsnýtslu hjá politinum sum liður í vanligum skilhaldi. Meginreglurnar eru vanligu reglurnar um neyðverju og neyðrætt í §§ 13 og 14 í revsilógini, heruppií § 13, stk. 3 um lógliga rættarverju, og ásetingin í § 108, stk. 1 í rættargangslógini, ið er nevnd aðalfulltrúin hjá politinum, og sum er orðað soleiðis: *”Politiets opgave er at opretholde sikkerhed, fred og orden, at påse overholdelsen af love og vedtægter samt at foretage det fornødne til forhindring af forbrydelser og til efterforskning og forfølgning af sådanne.”*

Í royndum hava hesa ásetingar trúliga í stóran mun verið ein vælvirkandi og góðtikin karmur um valdsnýtsluna hjá politinum, sum á fleiri økjum er nærri skipað við meira nágreiniligum fyrisitingarliga ásettum reglugerðum, m.a. um valdsmiðal sum skotvápn, politistav og politihundar.

Samstundis má ásannast, at ein so knøpp og almenn lóggáva á einum so týðandi øki sum valdsnýtslan hjá politinum, heruppií t.d. setan í bráðhald, neyvan í dag kann roknast sum nøktandi.

Í hesum sambandi kann eisini vísast til tann lóggávusið, sum hjá okkum hevur ment seg innan onnur fakøki, og at tað í fleiri øðrum londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, tey seinastu árini er gjørd nýggj lóggáva um virksemi hjá politinum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við lógaruppskotinum er at seta í gildi fyri Føroyar eina nútímans lóggávu fyri virksemið hjá politinum í Føroyum.
Í Danmark varð tann 1. august 2004 sett í gildi *lov nr. 444 frá 9. juni 2004 om politiets virksomhed*. Hendan lógin setti í verk eina samlaða og tíðarhóskandi lóggávu um virksemið hjá politinum í Danmark, heruppií serstakliga at áseta í lóg meginreglurnar fyri valdsnýtslu hjá politinum sum liður í vanligum skilhaldi.

Politilógin er upprunaliga grundað á *Politikommissionens betænkning nr. 1410/2004 om politilovgivning* og tað uppskotið, sum kommissiónin gjørdi. Síðani eru gjørdar nakrar broytingar.

Tað er hendan lógin við seinni broytingum, sum skotið verður upp at seta í gildi fyri Føroyar.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Við hesum lógaruppskotinum verður sett í verk ein grundleggjandi og samlað lóggáva um vanliga virksemið hjá politinum, sum eisini skipar grundleggjandi meginreglurnar fyri valdsnýtsluni hjá politinum sum liður í vanligum skilhaldi. Við Politilógini verða greiðar reglur á hesum øki. Hetta styrkir um rættartrygdina hjá borgarunum, samstundis sum at politiið fær eitt greitt grundarlag at arbeiða út frá í støðum, har politiið, fyri at kunna røkja sínar uppgávur, má fremja inntriv mótvegis borgarum, møguliga við at brúka tvingsil.

Endamálið við lógaruppskotinum er í høvuðsheitum at føra víðari og nágreina galdandi rætt á teimum økjum, sum § 108 í rættargangslógini í dag verður brúkt sum heimild at gera inntriv mótvegis borgarum. Tað er hvørki ætlanin at avmarka ella víðka verandi inntrivsmøguleikar. Lógin er lagað til føroysk viðurskifti við nøkrum smærri broytingum, sum kunnu síggjast undir serligu viðmerkingunum og í fylgiskjali 1.

Lógin skal samanhaldast við *Lov om Politiets Efterretningstjeneste*, PET-lógina, sum verður løgd fyri Løgtingið samstundis sum Politilógin. PET-lógin tryggjar rættartrygdina hjá teimum persónum, sum koma undir kanningar hjá PET, við tað at tann lógin skipar virksemið hjá PET og setir á stovn ein eftirlitsstovn, sum skal styrkja eftirlitið við viðgerðini hjá PET av upplýsingum um bæði likamligar og løgfrøðiligar persónar.

*1.4.1. Høvuðstættir í lógaruppskotinum*
Uppskotið til Politilógina hevur 7 kapitlar.

*Kapittul 1 (§ 1)* ásetir endamál og virksemi hjá politinum, sum er at virka fyri tryggleika, friði og skilhaldi í samfelagnum. Politiið skal fremja hetta endamál gjøgnum fyribyrgjandi, hjálpandi og handhevjandi virksemi.

*Kapittul 2 (§§ 2 og 2 a)* lýsir uppgávurnar hjá politinum. Eisini er heimild til politiið at brúka dátagrundaði greiningartól í sínum virksemi yvirhøvur. Ásett er, at politiið kann savna og viðgera almennar upplýsingar til brúk í sínum arbeiði. Løgmáláráðharrin kann áseta nærri reglur um viðgerð hjá politinum av upplýsingunum og striking av upplýsingum.

*Kapittul 3 (§§ 3-13)* skipar inntrivini hjá politinum. Her sæst, at politiið einans í teimum førum, sum eru ásett í hesum kapittlinum ella í aðrari lóggávu, kann gera inntriv mótvegis borgarum. Tað sæst eisini í hesum ásetingunum, at politiið m.a. hevur til uppgávu at fyribyrgja og forða fyri vanda fyri skilhaldi og trygd, at verja rættin hjá borgarum at savnast, og at taka sær av veikum og sárbærum persónsbólkum, sum ikki eru før fyri at ansa sær sjálvum, og sum politiið

kemur fram á undir slíkum umstøðum, at tey eru til vanda fyri seg sjálvi ella onnur. Politiið kann m.a. geva boð og fremja likamsskoðan og frælsistøku fyri at røkja nevndu fyrilit. Politiið kann eisini sum stakroyndir gera eftirlit á ávísum støðum av persónum o.ø. fyri at kanna, um nakar hevur vápn.

*Kapittul 4 (§§ 14-21)* hevur ásetingar um brúk av valdi hjá politinum. Ásetingarnar eru ein úttømandi uppreksan av teimum endamálum, sum kunnu vera grund fyri valdsnýtslu. Eisini sæst tað av ásetingunum, at valdsnýtsla skal vera neyðug og ráðilig og lutfalslig í mun til tað áhugamál, sum skal verjast. Kapittulin skipar harumframt brúk av serligu valdsmiðlunum sum skotvápni, stavi, gassi, hundi og piparsproyti.

*Kapittul 5 (§ 22)* skipar møguleikan hjá politinum undir ávísum treytum at seta tiltøk í verk sum gerð til sjálvhjálp.

*Kapittul 6 (§§ 23-24)* hevur heimildarásetingar til løgmálaráðharran, eftir hvørjum ráðharrin kann áseta reglur, heruppií við revsing við sekt, til at røkja tey atlit til skilhald, sum í dag eru ásett í politiviðtøkunum.

*Kapittul 6 a (§§ 24 a-24 e)* er um, nær og til hvørjar uppgávur, politiið kann fáa hjálp frá verjuni. Tá verjan hjálpir politinum, er tað undir leiðslu av politinum og í samsvari við tær reglur, sum eru galdandi fyri, hvussu politiið skal røkja slíkar uppgávur. Sí nærri fylgiskjal 15.

*Kapittul 7 (§§ 25-27)* eru ásetingar um gildiskomu og úrgildisseting av Lov nr. 55 af 13. april 1894 om Politiet på Færøerne og § 108 í rættargangslógini fyri Føroyar.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá:, Almannamálaráðnum, Heilsu- og innlendismálaráðnum, Mentamálaráðnum, Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, Fiskimálaráðnum, Samferðslumálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Føroya rætti, Føroya landfúta, Kriminalforsorgini, Kommunufelagnum, Dátueftirlitinum, TAKS, Amnesty International, Advokatfelag Føroya, MEGD - Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum, Føroya politistafelag og Vinnuhúsinum.

Lógaruppskotið hevur eisini ligið alment frammi á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni.

*Ummæli er komið frá* Heilsu- og innlendismálaráðnum, Mentamálaráðnum, Fiskimálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Dátueftirlitinum, Føroya landfúta, Føroya Kommunufelag, MEGD - Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum, Føroya politistafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

*Hesi hava ongar viðmerkingar til uppskotið:* Mentamálaráðið, Fiskimálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Føroya landfúti, Føroya Kommunufelag og Føroya politistafelag.

*Heilsu- og innlendismálaráðnum:*
Heilsu- og Innlendismálaráðið upplýsir, at tey hava eftirkannað, um ríkislógartilmælið hevur serligar avleiðingar fyri málsøkið hjá landsstýrismanninum í heilsu- og innlendismálum. Í kap. 3 um "svage og udsatte personer" eru ásetingar um, at tørvar persóni (serliga børnum) læknahjálp, skal persónurin kannast av lækna, og í kap. 4 um "særlige bestemmelser om visse magtmidler", eru ásetingar í §§ 17-20 um, at lækni skal gera kanningar av persónum, eftir at

løgreglan hevur nýtt vald. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ikki viðmerkingar til hesar ásetingar og metir annars ikki, at ríkislógartilmælið hevur serligar avleiðingar fyri heilsu- og innlendisøkið.

*Dátueftirlitið:*
Víst verður á, at løgreglan er felagsmál og tí ikki fevnd av føroyskari, men av danskari persónsupplýsingarlóggávu. Tað er persónsupplýsingarlógin, sum ikki longur er í gildi í Danmark, sum er galdandi fyri løgregluna í Føroyum. Tað er danska Dátueftirlitið - Datatilsynet, sum hevur eftirlit við, at viðgerðin av persónsupplýsingum, sum løgreglan í Føroyum ger, er lóglig og røtt.

Dátueftirlitið heldur, at tað er alneyðugt, at samstundis sum ríkislógartilmælið verður sett í gildi, eiga eisini kunngerðir at verða settar í gildi, sum áseta nærri, hvørjar persónsupplýsingar talan kann vera um at viðgera í teimum einstøku førunum, og hvør viðgerð lógliga kann fara fram í teimum ymsu høpunum.

Dátueftirlitið heitir tí á landsstýrið um at fylgja hesum máli upp, soleiðis at ein kunngerð verður gjørd fyri á hóskandi hátt at kunna regulera viðgerðina av persónsupplýsingum, sum PET fær heimild til at viðgera.

*Løgmanskrivstovan skal viðmerkja, at vanliga verður støða ikki tikin til, hvørjar kunngerðir skulu setast í gildi, fyrrenn Løgtingið hevur samtykt sjálvt ríkislógartilmælið.*

*Løgmálaráðið hevur sagt frá, at ætlanin er at seta 4 kunngerðir, sum eru lagaðar til føroysk viðurskifti, í gildi fyri Føroyar, tá Politilógin verður sett í gildi fyri Føroyar.*

*Talan er um hesar kunngerðirnar:*
1) *Bekendtgørelse for Færøerne om detentionsanbringelse,*
2) *Bekendtgørelse for Færøerne om politiets sikring af den offentlige orden og beskyttelse af enkeltpersoners og den offentlige sikkerhed mv., samt politiets adgang til at iværksætte midlertidige foranstaltninger (ordensbekendtgørelsen),*
3) *Bekendtgørelse for Færøerne om politiets anvendelse af visse magtmidler m.v., og*
4) *Bekendtgørelse om ændring af bekendtgørelse for Færøerne om behandling af personoplysninger i Politiets Efterforskningsstøtte Database (PED).*

*Ætlanin er at senda uppskot til kunngerðir til ummælis, tá ið ríkislógartilmælið er samtykt av Løgtinginum.*

*MEGD - Meginfelag teirra, ið bera brek í Føroyum:*
MEGD tekur undir við, at lógin um politiets virksomhed (politiloven) verður sett í gildi fyri Føroyar. Tað hevur týdning, at rættartrygdin hjá borgarunum verður styrkt, og at politiið fær greitt grundarlag at arbeiða út frá í støðum, har politiið, fyri at kunna røkja sínar uppgávur, má fremja inntriv mótvegis borgarum.

Eins og tað hevur týdning, at skynsamt verður farið fram við at taka sær av „veikum og sárbærum persónsbólkum, sum ikki eru før fyri at ansa sær sjálvum, og sum politiið kemur fram á undir slíkum umstøðum, at tey eru til vanda fyri seg sjálvi og onnur."

MEGD vísir á týdningin, at borgarar, ið hava avbjóðingar á ein hvønn hátt, fáa hóskandi viðferð, og at viðkomandi fakfólk verða boðsend, so tey í tilgongdini verða sædd, hoyrd og vird.

MEGD vísir eisini á ST sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, serliga grein 12-14 og 17. Sí nærri um hetta undir nr. 2.8.

*Løgmanskrivstovan tekur undir við sjónarmiðunum hjá MEGD.*

*Føroya Arbeiðsgevarafelag:*
Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ikki viðmerkingar til sjálvt lógaruppskotið. Tey vísa á, at tað eru heimildir í lógini um m.a. at gera kunngerð um politiviðtøkur, sum hava ávirkan á vinnuligt virksemi, serliga tænastu- og upplivingarvinnuna. Tað hevur stóran týdning, at hesar verða sendar í hoyring í góðari tíð, áðrenn tær verða lýstar í kunngerð.

*Løgmanskrivstovan tekur undir við sjónarmiðunum hjá Føroya Arbeiðsgevarfelag. Ætlanin er at senda tær 4 kunngerðirnar, sum nevndar eru sum viðmerking til ummæli frá Dátueftirlitinum, til ummælis, tá ið ríkislógartilmælið er samtykt av Løgtinginum.*

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, heruppií ríkismyndugleikar
Mett verður ikki at lógin hevur við sær fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, heruppií ríkismyndugleikar

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur, heruppií ríkismyndugleikar
Mett verður ikki at lógin hevur við sær umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur, men fyri virksemið hjá politinum er hetta partvíst nýggjar reglur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið merkir, at politiið fær nýggja lóggávu at arbeiða eftir, tó at hetta í mestan mun er nágreining av galdandi rætti. Fyri vanliga borgaran er lógaruppskotið ein betring av rættartrygdini, tí reglurnar nú verða lógfestar nágreiniliga í lóg.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á hesum økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan, EMRS, ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Uppskotið hevur tí ikki fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar grundað á skyldur í millumtjóðasáttmála.

*2.8.1. Mannarættindasáttmálin artikul 8*
Í § 6 í uppskotinum er sæst, at politiið kann steðga einum persóni á gøtuni ella almennum staði og likamskanna viðkomandi umframt at kanna klæðir, aðrar lutir og bil hjá viðkomandi, fyri at kanna, um viðkomandi ber vápn. Hetta er eitt inntriv í eginfriðin, sum er ein rættur, ið er vardur í art. 8 í Mannarættindasáttmálanum. Hendan heimildin hjá politinum er sera avmarkað, við tað at politiið einans kann brúka heimildina, um tað er øktur vandi fyri, at onkur á einum ávísum staði ella til ávíst tiltak fer at fremja revsiverdar gerðir, sum kunnu vera til vanda fyri lív, heilsu og vælferð hjá fólki. Fútin tekur slíka avgerð, sum skal vera ítøkilig skrivlig og grundað. Undir hesum umstøðum verður mett, at heimildin ikki er brot á art. 8. í EMRS.

*2.8.1. Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek:*
MEGD vísir í sínum ummæli eisini til ST sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, har grein 12-13 eru soljóðandi:

*Grein 12. Eins fyri lógini*
1. Limalondini vátta uppaftur, at fólk, ið bera brek, hava rætt til alla staðni at fáa sítt rættarføri viðurkent.
2. Limalondini ásanna, at fólk, ið bera brek, eiga rættarføri á jøvnum føti við onnur í øllum lívsins viðurskiftum.
3. Limalondini skulu taka hóskandi stig at útvega fólkum, ið bera brek, atgongd til tann stuðul, tey kunnu hava tørv á til tess at nýta sítt rættarføri.
4. Limalondini skulu tryggja, at øll stig, sum viðvíkja tí at útinna rættarføri, fata um hóskandi og munagóð verjutiltøk til at fyribyrgja misnýtslu sambært altjóða mannarættindalóg. Slík stig skulu tryggja, at atgerðir viðvíkjandi at útinna rættarføri, virða rættindi, vilja og áhugamál hjá fólkinum, ikki hava egináhugamál og óhóskiliga ávirkan, standa mát við og eru lagað eftir umstøðunum hjá einstaklinginum, krevja stytst møguliga tíð og verða javnan endurskoðaðar av skikkaðum, uttanveltaðum og óheftum myndugleika ella dómsvaldi. Verjutiltøkini skulu standa mát við ta ávirkan, sum slík stig hava á rættindi og áhugamál hjá einstaklingi.

*Grein 13. Atgongd til rættarskipanina*
*Stk 1.* Limalondini skulu tryggja, at um so er, at fólk, ið bera brek, verða frælsisskerd av einihvørjari orsøk, skulu tey á jøvnum føti við onnur hava rætt til trygd í samsvari við altjóða mannarættindi og skulu verða viðfarin í samsvari við endamál og meginreglur í ST sáttmálanum.
*Stk 2.* Til tess at tryggja fólki, ið bera brek, at tey fáa brúkt rættarskipanina, skulu limalondini virka fyri, at tey, sum arbeiða í rættarfyrisitingini, harímillum løgregla og fongsulsstarvsfólk, fáa hóskandi uppvenjing í tí.

Eisini vil MEGD vísa á at sambært *grein 14, stk. 1, litra b um frælsi og trygd hins einstaka*, skulu limalondini tryggja, at fólk, ið bera brek, á jøvnum føti við onnur, ikki verða fongslað

ólógliga og tilvildarliga, og at øll frælsisskerjing skal vera í samsvari við lógina, og at brek má í ongum føri rættvísgera frælsisskerjing.

MEGD vísir eisini á *grein 17 um at verja sjálvræðisrætt (integritet) hins einstaka*, har tað er ásett, at ein og hvør, ið ber brek, hevur rætt til virðing fyri sínum likamliga og sálarliga sjálvræðisrætti (integritet) á jøvnum føti við onnur.

**2.9. Markaforðingar**

Markaforðingar eru lógir, almennar reglur og siðvenjur, ið tarna flytføri hjá tí einstaka ella møguleikanum hjá fyritøkum at virka um landamørk í Norðurlondum.

Tað eru ongar kendar markaforðingar viðvíkjandi politivirksemi í Føroyum í mun til onnur norðurlond.

Marknaforðingar koma vanliga av, at lóggávan í londunum kring okkum og okkara lóggáva ikki eru samskipaðar. Eru skipanirnar í londunum ikki samskipaðar, kunnu vera krøv í lóggávuni, sum hava við sær óhepnar og ótilætlaðar avleiðingar.

Tað verður mett, at lógaruppskotið ikki elvir til nýggjar markaforðingar, av tí at talan er um avgerðir, sum bara eru galdandi í Føroyum.

Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar ella tarnar ikki flytføri hjá tí einstaka borgaranum. Uppskotið ávirkar ikki umstøðurnar hjá fyritøkum at virka um landamørk millum Føroyar, Danmark og Grønland.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Í § 23, stk 3 í lógini er ásett, at brot á reglur ásettar sambært lógini, ella um bann ella boð sambært slíkum reglum ikki verður fylgt, kann revsingin verða sekt ella fongsli í upp til 1 ár og 6 mánaðar. Í § 24 er ásett, at brot á politiviðtøkur kann revsast við sekt.

**2.11. Skattir og avgjøld**

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**

Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**

Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á fólk, so sum upplýsingarskyldu, skrásetingarskyldu ella t.d. krøv um loyvi.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Lógaruppskotið gevur í § 2 a, § 11, stk. 5, § 21, § 23, § 24, § 24 c og § 24 e løgmálaráðharranum heimild at áseta nærri reglur um ymisk viðurskifti, so sum reglur um hvussu politiið viðger upplýsingar, reglur um setan í bráðhald, læknakanning og umsjón við innsetta, reglur um brúk av skotvápni, stavi, hundi, gassi og piparsproyti, reglur um allmennan frið og skilhald o.a., reglur um politiviðtøkur fyri kommunur og reglur um hjálp frá verjuni o.a.
Løgmálaráðið hevur upplýst, at ætlanin er at seta 4 kunngerðir, sum eru lagaðar til føroysk viðurskifti, í gildi fyri Føroyar, tá Politilógin verður sett í gildi fyri Føroyar.

Talan er um hesar kunngerðirnar:

1) Bekendtgørelse for Færøerne om detentionsanbringelse,
2) Bekendtgørelse for Færøerne om politiets sikring af den offentlige orden og beskyttelse af enkeltpersoners og den offentlige sikkerhed mv., samt politiets adgang til at iværksætte midlertidige foranstaltninger (ordensbekendtgørelsen),
3) Bekendtgørelse for Færøerne om politiets anvendelse af visse magtmidler m.v., og
4) Bekendtgørelse om ændring af bekendtgørelse for Færøerne om behandling af personoplysninger i Politiets Efterforskningsstøtte Database (PED).

Ætlanin er at senda hesar kunngerðirnar til ummælis, tá ið ríkislógartilmælið er samtykt av Løgtinginum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur í § 5, stk. 4, § 8, stk. 5 og § 9, stk. 4 politinum heimild til, uttan rættarúrskurð, at skaffa sær atgongd til eitt ikki alment atkomuligt stað, um tað er neyðugt til tess at forða fyri vanda fyri almennum friði og skilhaldi, vanda fyri stakpersóni og almennu trygdini.

Í § 10, stk. 2, § 11, stk. 2 og § 13, stk. 2 fær politiið heimild, uttan rættarúrskurð, at skaffa sær atgongd til eitt ikki alment atkomuligt stað, um tað er neyðugt fyri, at politiið skal kunna gera neyðugar metingar av støðuni og vandanum og fyri at finna út av, hvør viðkomandi persónur er, í teimum førum har politiið má taka sær av fólki, herundir børnum, sum ikki eru før fyri at ansa sær sjálvum vegna sjúku, skaðatilburði ella hjálparloysi annars og orsakað av rúsandi evnum.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar. (ríkis-myndugleikar) | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Viðvíkjandi serligu viðmerkingunum til tær einstøku greinirnar verður víst til fylgiskjal 12, sum er lógaruppskotið til Politilógina, *lov nr. 444 af 9. juni 2004 om politiets virksomhed.*

Eisini kann vísast til betænkning nr. 1410/2001 frá Politikommissionen, Betænkning om politilovgivning.

Hendan sæst her:
https://rosendahlsonline.dk/skin/jm/publikationer/betænkninger/bet1410/pdf/bet1410.pdf

### 3.1. Tillagingar sum eru gjørdar í lógini grundað á føroysk viðurskifti

**Til § 6**
Greinin er tillagað, tí at vápnalóg og spreingilóggáva eru føroysk sermál. Tað er tí beinleiðis ásett í lógini, at á alment atkomuligum støðum, útbúgvingarstøðum, í ungdómsklubbum, frítíðarskipanum o. tíl. kann politiið kanna persónar, bilar o.a. við atliti at kanna, um nakar ber vápn.

**Til §§ 6, stk. 3, § 23, stk. 2 og § 24, stk. 2.**
Heitið "politidirektør" er í uppskotinum broytt til "landfoged", Fútin.

**Til § 23, stk. 1.**
Í § 23, stk. 1 í lógaruppskotinum hevur løgmálaráðharrin heimild at áseta nærri reglur um alment skilhald og verju av stakpersónum og almennari trygd, fyribyrging av vanda og ónáðir fyri ferðslu, djór á almennum vegi, almen støð, húsanummar og uppslag, vinnuvirksemi á vegi, alment undirhald, reinhald av vegi o.a.

Tað er ein fyritreyt, at heimildin í § 23, stk. 1 verður tulkað við virðing fyri heimastýrisskipanini, soleiðis at tað við heimild í hesi greinini einans verða ásettar reglur um felagsmál.

**Til § 24**
Føroyar eru eitt politiøki. Greinin er tí lagað til føroysk viðurskifti soleiðis, at løgmálaráðharrin í staðin fyri kann gera eina politiviðtøku fyri hvørja kommunu í Føroyum.

Sambært stk. 5 skulu politiviðtøkur kunngerast í Lovtidende og í Kunngerðarblaðnum.

**Til § 24 b**
Tilvísingarnar til rættargangslógini eri lagaðar til rættargangslógina fyri Føroyar.

**Til § 25**
Skotið er upp at fyriskipanin kemur í gildi 1. janaur 2021. Hetta er sami dagur, sum PET-lógin ætlandi skal koma í gildi.

**Til § 26**
Gamla Politilógin, lov nr. 55 af 13. april 1894 om politiet på Færøerne, verður sett úr gildi. Samstundis fara eisini gomlu politiviðtøkurnar úr gildi.

Í staðin fyri politiviðtøkurnar er ætlanin at seta *Ordensbekendtgørelsen* í gildi fyri Føroyar. Tað er Bekendtgørlse for Færøerne om politiets sikring af den offentlige orden og beskyttelse af enkeltpersoner og den offentlige sikkerhed mv., samt politiets adgang til at iværksætte midlertidige foranstaltninger. Ætlanin er at senda uppskot til kunngerð til ummælis, tá ið ríkislógartilmælið er samtykt av Løgtinginum.

**Til § 27**
Eisini verður § 108 í rættargangslógini sett úr gildi (lovbekendtgørelse nr. 148 af 9. marts 2004 om lov for Færøerne om rettens pleje, sum seinast broytt við lóg nr. 428 frá 3. mai 2017).

Hóast Politilógin ikki hevur eina áseting svarandi til § 108, stk. 2 í rættargangslógini, sum ásetir, at ávísar uppgávur einans kunnu leggjast til politiið við samtykki frá løgmálaráðnum, so er tað framvegis ein fyritreyt, at uppgávur ikki kunnu leggjast til politiið, uttan at hetta frammanundan er umrøtt við løgmálaráðharran.

**Til § 28**
Kunngerðir verða vanliga ikki settar í gildi fyri Føroyar við fyriskipanini. Tá Løgtingið hevur samtykt sjálvt ríkislógartilmælið, tekur landsstýrið saman við løgmálaráðnum støðu til, hvørjar kunngerðir skulu setast í gildi fyri Føroyar.

Løgmálaráðið hevur sagt frá, at ætlanin er at seta 4 kunngerðir, sum eru lagaðar til føroysk viðurskifti, í gildi fyri Føroyar, tá Politilógin verður sett í gildi fyri Føroyar.

Talan er um hesar kunngerðirnar:
1) Bekendtgørelse for Færøerne om detentionsanbringelse,
2) Bekendtgørelse for Færøerne om politiets sikring af den offentlige orden og beskyttelse af enkeltpersoners og den offentlige sikkerhed mv., samt politiets adgang til at iværksætte midlertidige foranstaltninger (ordensbekendtgørelsen),
3) Bekendtgørelse for Færøerne om politiets anvendelse af visse magtmidler m.v., og
4) Bekendtgørelse om ændring af bekendtgørelse for Færøerne om behandling af personoplysninger i Politiets Efterforskningsstøtte Database (PED).

Ætlanin er at senda uppskot til framamanfyri nevndu kunngerðir til ummælis, tá ið ríkislógartilmælið er samtykt av Løgtinginum.

Løgmansskrivstovan, 3. mars 2020

**Bárður á Steig Nielsen**
løgmaður

/ Marjun Hanusardóttir

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**

Fylgiskjal 1: Resumé hjá Løgmálaráðnum.
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Mentamálaráðnum.
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Fiskimálaráðnum.
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Fíggjarmálaráðnum.
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Dátueftirlitinum.
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Føroya landfúta.
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Føroya Kommunufelag.
Fylgiskjal 9: Ummæli frá MEGD - Meginfelag teirra ið bera brek í Føroyum.
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Føroya politistafelag.
Fylgiskjal 11: Ummæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag.
Fylgiskjal 12: Forslag til Lov om politiets virksomhed. 2003/1 LSF 159.
Fylgiskjal 13: Viðmerkingar til § 20 a um piparsproyt í hesi fyriskipanini. Forslag til lov nr. 1722 af 27. desember 2016.
Fylgiskjal 14: Viðmerkingar til § 2 a í hesi fyriskipanini. Forslag til lov nr. 671 af 8. juni 2017. SF.L L 171
Fylgiskjal 15: Viðmerkingar til Kapittul 6 a í hesi fyriskipanini. Forslag til lov nr. 708 af 8. juni 2018. 2017/1 LSF 159